# Ímyndin av tollyndi millu

**Í hesum døgum, sum er merkt av tørvandi trúnaðarligum tollyndi, ikki minst millum krisnta og muslimska heimin, er tað hugaligt at frætta frá einum dømi um tað mótsatta, og tað júst í býnum, har Jesus var føddur**



House of Hope í Betlehem, er veruliga eitt hús við vón. Her kunnu føroyingar eisini stuðla.

## House of Hope



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

Um páskini var ein forkunnug vitjan í Føroyum. Hetta var Rhoda David, sum er leiðari á House of Hope, vanliga nevnt blindaheimið, í Betlehem. Hetta er eitt heim, sum nógvir føroyingar kenna. Svenning av Lofti, sum í ártíggir hevur skipað fyri ferðum til Ísraels, hevur hetta heim sum ein fastan tátt í ferðaskránni. Tískil hava túsundir av føroyingum verið á gátt.

Tann, sum skrivar hetta, er ein teirra. Hann var saman við konuni og trimum av børnum teirra á vitjan her júst á teirra silvurbrúðleypsdegi 3. oktober 2006. Semja er millum tey vitjandi um, at hetta er eitt framúr átak.

Rhoda hevur ferðast kring landið og hevur greitt frá hennara virksemi, eins og hon hevur verið í Rás 2 og greitt frá.

Rhoda hevur eina áhugaverda bakgrund. Hon er kristin arabari og er ættað úr Haifa, sum er í sjálvum Ísrael. Hon er fødd í Nasareth, sum eisini er "heimabeiti" hjá føroyingum. Tískil er hon ísraelskur ríkisborgari við øllum teimum rættindum, sum hetta inniber.

Hon er sum so eisini partur av søguni hjá Ísrael og arabarum. Tá ið Ísrael varð stovnsett í 1948 rýmdu nógvir arabarar úr landinum, og nógvir av teimum hava búð í flóttarlegum í grannalondunum. Júst teir hava verið ein partur av ófriðinum, sum síðan hevur verið í hesum øki.

Men foreldrini hjá Rhodu fóru ongan veg, og tað mundi vera betri parturin. Hetta merkir eisini, at tey eingi skyldfólk eiga í Ísrael. Tey eru øll í grannalondunum. Familjan hjá Rhodu vóru annars virkin í eini lítlari brøðrasamkomu í Haifa.

Rhoda giftist við Michael, sum tá leiddi blindaheimið í Betlehem. Tey fingu seks børn, men Michael doyði í bestu árum í 1999, og nú er tað hon, sum er leiðari við hollum stuðli frá vermóður síni og øðrum starvsfólki. Nógv av teimum eru sjálvboðin úr ymiskum londum. Millum teir føroyingar, sum hava arbeitt har, eru Ása Hansen úr Fuglafirði, sum eisini giftist við einum, hon hitti á heiminum, Tordur Niclassen av Eiði og Anna Maria Anthoniussen úr Fuglafirði. Hon var eisini við á samkomunum í Føroyum saman við Rhodu. Hon greiddi frá, hvussu tað var hjá eini føroyskari gentu at arbeiða á einum slíkum stað. Hon var har í 14 mánaðir og lærdi seg eisini arabiskt. Hon hevur alt gott at bera arabarum, bæði kristnum og muslimskum. Ikki minst tekur hon til teirra gestablídni. Tá tey vóru boðin inn í arabisk heim, skuldu gestirnir fyrst fáa alt tað, tey orkaðu at eta, og so kundi húsfólkið fáa avlopið.

Hon var eisini við til at læra ein av búfólkunum at ganga. Tá ið hann kom, grulvaði hann, men við miðvísari venjing kom hann á føtur.

### Betlehem

Í Betlehem búgva í dag 35.000 fólk, sum øll eru arabarar. Tað er bert ein løta at koyra frá Jerusalem, men kortini er hetta sum at koma til eitt heilt fremmant land. Betlehem liggur á palestinskum sjálvstýrisøki, og millum hesi og Ísrael er bygdur ein umstríddur múrur, sum skal forða yvirgangsmonnum at koma inn í Ísrael. Hetta er kanska skiljandi, men lýsir hesin múrur einsamallur støðuna í økinum.

Afturat hesum kemur, at bussar frá Ísrael kunnu bert koyra til múrin. Tá má skiftast til buss úr Betlehem við lokalum førara at koyra restina av teininum.



*Anna Maria Anthoniussen úr Fuglafirði hevur arbeitt á heiminum meira enn eitt ár og hevur eisini givið sítt íkast til hesa uppgávu.*

Betlehem er sjálvsagt nógv merktur av, at Jesus varð føddur har. Umframt eru nógvar aðrar bíbilskar hendingar knýttar at Betlehem. Hetta merkist ikki minst á kirkjunum í býnum. Tveir triðingar ella meira av fólkatalinum eru muslimar. Hesin partur økist í hvørjum. Ein orsøk er, at muslimar fáa fleiri børn enn kristin, og ein onnur er, at nógv kristin flyta av landinum, serstakliga til USA og Suðuramerika.

Tey flestu kristnu eru griskortodoks. Hetta merkir, at tey halda jól tvær ferðir í Betlehem. Fyrst "okkara" jól, og síðan jólini hjá ortodoksu kirkjuni 7. januar. Har er so eisini ein lítil brøðrasamkoma.

### Blindaheimið

House of Hope er eitt heim og skúli, sum verður rikið av arabarum á einum kristiligum grundarlagi. Her verður gjørt eitt gott arbeiði partvíst fyri ung og eldri blind, kropsliga brekaðar ungar menn og partvíst fyri børn, sum eru menningartarnað. Hesi eru ofta eru fyri vanbýti á leiðum sum hesum.

Hetta arbeiðið byrjaði í 1963 av eini blindari kvinnu, May Ladah, nevnd „Aunty May", sum doyði í 1993, 89 ára gomul. Afturat sær hevði hon eina síggjandi hjálparkvinnu, Christine David, sum gjørdist vermóður Rhodu. Byrjað varð í smáum, men sum frá er liðið, er virkið økt, og umstøðurnar er nógv bøttar. Nú eru umstøðurnar góðar við tveimum uppá seg stórum bygningum.

Einir 40 næmingar eru á skúlanum. Summir búgva har, og aðrir koma frá økinum í og kring Betlehem og búgva heima. Næmingarnir verða koyrdir í og úr skúla, og teir fáa eisini eina heita máltíð í skúlanum. Hjá fleiri er hetta einasti biti, tey fáa á degnum.

Tey allarflestu, sum fáa hjálp á heiminum, eru muslimar. Men hetta er eingin trupulleiki hjá nøkrum av pørtunum.

Virksemið hjá House of Hope verður fíggjað av vinum, kirkjum, samkomum og felagsskapum. Uttan slíkan stuðul, eisini uttani frá, hevði arbeiðið verið ómøguligt. Føroyingar hava eisini stuðlað.

Tað eru 15-20 lønt starvsfólk á heiminum. Aftrat tí eru og hava



*Rhoda David vitjaði eisini í fornminnisavningum Blása stova í Norðragøtu. Her stendur hon undir glerpípunum í Glyvr-Hanusarhúsi, sum er ein partur av savninum*